# LUTASEÐIL




1. Toyota Corolla Hatchback virði 169.400 kr.
   (Frá Reyni Service)
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm við frítíðaruppihaldi í 1 viku í Danland virði 15.000 kr.
   (Frá Smyril Line)
3. Gávukort frá Th. Dam á Hálsi virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Shell virði 5.000 kr.
5. Gávukort frá Statoil virði 5.000 kr.
6. Gávukort frá Statoil virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Statoil virði 5.000 kr.
9. Apex ferðaseðil fyri 1 persón virði 2.800 kr.
10. Føroyskt krov virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 7. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 8. og 9. august 2000.
Eisini verða vinnaratølini løgd út á heimasíðu: www.sporthal.fo

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð 2000 20 kr.



variant

Galvaniseraðir viðfestisvognar



Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820







**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3003

**Navn:** Sp/f Blátt
**Adressa:** Heygsbreyt 12, kj., 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 18.05.2000
**Vi›tøkudato:** 18.05.2000
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Hans á Lag, Heygsbreyt 12, kj., 100 Tórshavn og Martin Leander Ansbjørn, Marknagilsvegur 53, kj., 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Hans á Lag, Heygsbreyt 12, kj., 100 Tórshavn og Martin Leander Ansbjørn, Marknagilsvegur 53, kj., 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av bá›um stjórunum.
**Grannsko›ari:** : Grannsko›aravirki› Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.10. - 30.09
**Fyrsta roknskaparár:** 18.05.2000 - 30.09.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og ídna› innan undirhald.

Skráseting Føroya tann 23. mai 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2687, **Sp/f VIT, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 19.04.2000
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 211.000,00 til kr. 327.000,00. Flokkar: A kr. 301.000,00 og B kr. 26.000,00.
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 211.000,00 til kurs 100. Flokkur: A. kr. 211.000,00.
**Nevnd:** Farin úr nevndini: Hans David Poulsen, Tra›argøta 25A, 160 Argir og Ólavur Ellefsen, Reynagøta 26, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Frí›bjørg Andreasen, Sámalsgøta 2, 100 Tórshavn, Frank Djurhuus Jakobsen, Andrasargøta 9, 188 Hoyvík og Annika Petersen, Millum Gilja 47, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 23. mai 2000

Kristin Balle

---


Allar støddir
• Rundsagabløð
• Diamantskivur
• Skeriskivur
Vit hvessa eisini



Tórshavnar Maskinhandil
v/Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn • Tel. 313442



## Almennur fyrilestur

verður
á Sjómansheiminum í Havn
leygardagin 27. mai kl. 14.30

Did Nicolajsen, kostráðgevi, sigur frá um kost og ovurviðkvæmi.

Hvøi verður at keypa bøkur, filmar, pjesur og annað. Ókeypis kaffi og køka.

Føroya Astma/Allergifelag
stuðlað av Dadduni barnaklæði



## Servitrisa søkist

Søkt verður eftir servitrisu skjótast gjørligt.
Tel. 213430.



MARCOPOLO

Sosialurin - 311820



## Frítíðaravloysari søkist

Søkt verður eftir frítíðaravloysara frá 13. juni til 28. juli 2000.

Arbeiði umfatar: Útkoyring av vørum, heintan av vørum og annars alt fyrifallandi arbeiði í handli okkara.

P/F Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 • Tórshavn
Tel. 311909



## DYNAPAC
-maskinurnar sum halda!

• Asfaltleggjarir
• Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
• Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum
• Glittemaskinur
• Dykpumpur
• Eykalutir



Keyp góðsku – keyp Dynapac!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



Føroya størsta úrval av
## PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:

* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK

Staravegur 5, P.O. Box 171
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com





Bahá'í samfelagið í Tórshavn

Miðstøðin í Gundadali

Opið hvørt fríggjakvøld.
Samkoma kl. 20

»Øll skylda mansins á hesum degi er, at tilogna sær tann part av teirri náðiflóð, sum Guð skeinkir honum.«
Bahá'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo



sosialurin
Altið fyrst við
www.sosialurin.fo








Lesið eisini
ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo


# Eingin megnar at taka B36

*3. deild: AB tykist ætla sær at gera álvara burturúr vónini um at gerast triðji møguleikin í høvuðsstaðnum*



*Kí vann aftur á heimavølli. Hesa ferð í sera spennandi dysti móti B68*

***Mynd: JH***

Undanfarin ár hevur tað mangan verið soleiðis, at tað so at siga í hvørjum umfari hevur verið í hvussu so er ein og ofta fleiri stórir sigrar. Soleiðis tykist tað ikki at vera í ár. Síggja vit burtur frá stórkiksaranum hjá KÍ á Argjum, so hava tapini ongantíð verið stór, og tað vóru tey heldur ikki síðsta vikuskifti.

Argjamenn vóru í eldinum tvær ferðir. Fríggjadagin spældu teir sambært skránni á heimavølli móti VB, og sunnudagin vóru teir í Miðvági og spældu útsettu dystin móti FS Vágar.

### TB–FS Vágar

Tvøråmenn iðraðu seg nógv, tá tað var greitt, at teir bara fingu eitt stig burturúr vitjanini hjá vágamonnum. FS Vágar skoraði tvey mál síðstu fimm minuttirnar av fyrra umfarinum, og hóast TB trýsti og trýsti og hevði eina røð av hornaspørkum, so fingu teir ikki mál. Heldur ikki tá málverjin hjá teimum, Birgir Dimon, kom fram at hjálpa. Men í evstu løtu eydnaðist tað Eyðun Gullok Svalbard at stúta í kassan.

Álopsmaðurin Kaj Roest legði í 1. hálvleiki heimaliðið fram um, tá hann fór sjálvur.

### KÍ–B68

Klaksvíkingar høvdu ein góðan dag móti B68. At tað eisini skuldi ganga væl í 3. deild var altíð væntandi, tá manningarnar komu á vøllin, tí fleiri av teimum, sum høvdu sitið á beinkinum í 1. deild vóru á liðnum. Millum teirra vóru Tomislav Sivic og unglingaspælararnir Hjalgrím Elttør og Símun Joensen.

Klaksvíkingar vóru greitt omaná fyrstu løtuna, og teir komu framum 2–0, men í løtuni kring steðgin svaraði B68 orduliga aftur. Veteranurin Aksel Højgaad skoraði øll trý málini hjá toftamonnum. Tað fyrsta stútaði hann eftir innlegg, og í hinum báðum førunum var hann blankur mitt fyri málinum.

Tað var rættuliga spennandi, tá støðan var 3–3, men tíggju minuttir undan leikloki eydnaðist tað ??? at ???

### B71–B36

Tað er ikki altíð, at tað í fótbólti gongur, sum tað verður hildið at vera rættvíst. B36 var ikki so væl mannað á Sandi, sum teir hava verið undanfarnu ferðirnar, men teir høvdu marginalirnar við sær og eru framvegis ósigraðir.

Einasta málið kom, tá 60 minuttir vóru farnir. Málskjútti var Bjarke Sørensen, tá bólturin stakk á hann, eftir at málverji og verjuspælari stoytti saman eftir hornaspark.

Sandoyingar høvdu bóltin mesta partin av tíðini, og teir spældu seg eisini til onkran møguleika, men Guðmund Guðmundsson í málinum vardi sera væl.

### Skála–ÍF

Fuglfirðingar vóru ikki nøgdir við, at teir einki fingu burturúr stevnudystinum á Skála. Áðrenn ÍF kom á odda, høvdu teir havt tveir stórar møguleikar. Leiðslumálið fingu teir, tá Jógvan Arnfinn Jacobsen heilfluktaði hornasparksinnlegg frá Leivuri á Lakjuni í kassan. Uppskriftin var næstan tann sama, tá ÍF minkaði um munin til 3–2. Ta ferðina stútaði Jógvan Arnfinn frisparksinnlegg frá Leivi í málið.

Skálmenn skoraðu tríggjar ferðir, áðrenn ÍF svaraði aftur, og vit frætta, at ÍF málverjin var ikki serliga heppin í onkrum førum. Fyrsta málið fekk heimaliðið eftir at ÍF hevði havt deyðbólt. Skálamenn gjørdu skjótt av, rangstøðan hjá ÍF kiksaði, og so var Pauli Hansen púra leysur.

Tá heimaliðið kom á odda, var talan um høgan bólt úr vinstru, sum tóktist vera innlegg. Bólturin datt móti málinum, og ÍF málverjin var óheppin at missa hann inn um strikuna. Triðja málið varð stútað eftir innlegg úr vinstru og til handara stólpa.

Tá støðan var 3–2 var spennandi í eina góða løtu, áðrenn Kaisten Rasmussen slerdi heimasigurin fastan.

### AB–VB

Heimaliðið var sera væl upplagt fyrstu løtuna. Tá spældu teir mótstøðumenninar út av vøllinum. 5–0 var støðan, tá hálvur tími var farin, og so tóktust teir í AB taka sær meiri av løttum.

Fyrsta málið fekk Jóannes Bæk beinanvegin. VB misti á veg í álop, og verjan var sum opnahjallur. Petur Ritter økti eftir horna og blokerað langskot, Oddbjørn Joensen skoraði til 3–0, eftir at Jóannes Bæk hevði spælt út frá baklinjuni, Signar Johannesen økti til 4–0 eftir horna, og Oddbjørn Joensen skoraði til 5–0 eftir kiksaða rangstøðufellu.

Unglingaspælarin Kári á Lágabø sum onkuntíð hevur verið á besta VB liðnum í steypakappingini, minkaði um munin, tá hann sera hegnisliga sneiddi seg leysan, og hann var eisini maðurin aftanfyri seinna málið hjá VB. Egil Steintórsson minkaði um munin til 6–2. Síðsta AB málið fekk Sigurd Justinussen, og so skal tað eisini nevnast, at Petur Ritter misnýtti brotsspark í 2. hálvleiki.

### FS Vágar–AB

Onkrir av stuðulsspælarunum hjá AB vórðu spardir í seinna umfarinum móti VB, so tað tóktist ikki nerva stórvegis, at AB hevði spælt tveir dagar frammanundan.

AB var leikliga omaná í 1. hálvleiki, tá Oddbjørn Joensen setti hol á eftir uppspæl í vinstru. Næsta málið fekk Benny Poulsen, eftir at málverjin hevði hálvbjargað tveimum royndum frá Peturi Ritter.

Birgir Hansen minkaði um munin við fløtum skoti úr 16 metrum, og so var spennandi. FS Vágar hevði nógv trýst, teir stútaðu og skutu onkuntíð móti málinum, men teir høvdu ikki upplagdar møguleikar, og so var tað, at aftasti AB maðurin, Heri Petersen, slerdi sigurin fastan eftir kontraálop, har Svenning W. Hansen og Fróði Stenberg stóðu fyri uppspælinum.

JH

### 5. umfar

Dýra biðjudag

**TB–FS Vágar 2–2 (1–2)**
1–0: Kaj Roest
1–1: Tróndur Ravnsfjall
1–2: Tróndur Ravnsfjall
2–2: Eyðun Svalbard

**KÍ–B68 4–3 (3–1)**
1–0: Símun Joensen
2–0: Símun Joensen
2–1: Aksel Højgaard
3–1: Hjalgrím Elttør
3–2: Aksel Højgaard
3–3: Aksel Højgaard
4–3: Hjalgrím Elttør

**B71–B36 0–1 (0-0)**
0–1: Bjarke Sørensen

**Skála–ÍF 4–2 (3–1)**
0–1: Jógvan Arnfinn Jacobsen
1–1: Pauli Hansen
2–1: Ronnie Hansen
3–1: Niels Thomsen
3–2: Jógvan Arnfinn Jacobsen
4–2: Kaisten Rasmussen

**AB–VB 6–2 (5–0)**
1–0: Jóannes Bæk
2–0: Petur Ritter
3–0: Oddbjørn Joensen
4–0: Signar Johannesen
5–0: Oddbjørn Joensen
5–1: Kári á Lágabø
6–1: Sigurd Justinussen
6–2: Egil Steintórsson

### 4.umfar

sunnudagin 21. mai

**FS Vágar–AB 1–3 (0–1)**
0–1: Oddbjørn Joensen
0–2: Benny Poulsen
1–2: Birgir Hansen
1–3: Heri Petersen

### 6. umfar

sunnudagin
FS Vágar–VB
B68–Skáli
B36–KÍ
TB–B71
ÍF–AB

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Signar Johannesen | AB | 6 |
| Aksel Højgaard | B68 | 5 |
| Egil Steintórsson | VB | 5 |
| Oddbjørn Joensen | AB | 4 |
| Dánial Petur Johansen | B36 | 4 |
| Aksel Johannesen | KÍ | 4 |
| Regin Arge | B36 | 3 |
| Vinjard Guttesen | B36 | 3 |
| Jóannes Jakobsen | B68 | 3 |
| Kristoffur Vidtfeldt | B71 | 3 |
| Jákup Baldvonsson | ÍF | 3 |
| Eyðun Svalbard | TB | 3 |
| Just Johannesen | TB | 3 |
| Kaj Roest | TB | 3 |
| Kári í Lágabø | VB | 3 |

**Støðan, 3. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 19 | 4 | 15 | 15 |
| 2 | AB | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 26 | 8 | 18 | 12 |
| 3 | KÍ | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 15 | 22 | -7 | 9 |
| 4 | B68 | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 17 | 14 | 3 | 7 |
| 5 | ÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 13 | 16 | -3 | 6 |
| 6 | Skála | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 12 | 15 | -3 | 6 |
| 7 | B71 | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 10 | 14 | -4 | 6 |
| 8 | TB | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 15 | 16 | -1 | 5 |
| 9 | FS Vágar | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 9 | 13 | -4 | 4 |
| 10 | VB | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 12 | 26 | -14 | 3 |